# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Tann kongresslimur, sum váðar sær at vera líka jaligur mótvegis palestinum sum Ísrael, fremur politiskt sjálvmorð*

*Jimmy Carter*

# Ísrael er verri enn Suðurafrika



*Jimmy Carter leggur Ísrael undir at brúka framferð, sum er verri, enn apartheid var í Suðurafrika.*

**- Ísraelska framferðin ímóti palestinska fólkinum er verri enn apartheid var í Suðurafrika, skrivar fyrrverandi amerikanski forsetin Jimmy Carter í nýggjari bók**

Jimmy Carter, sum fekk Nobel-friðarheiðurslønina fyri at hava fingið í lag friðaravtaluna millum Ísrael og Egyptaland, er rættiliga komin í eldin, nú hann hevur givið út bók um viðurskiftini í Miðeystri.

Bókin ”Palestine. Peace not Apartheid” hevur fleiri hvassorðaðar atfinningar at bæði palestinum og ísraelsmonnum, men tað er einki at taka seg aftur í, at atfinningarnar at Ísrael eru tær hvassastu. Millum annað skrivar tann gamli forsetin, at Ísrael hevur sett í verk apartheid-skipanir ímóti muslimum og kristnum.

Jimmy Carter vil vera við, at bólkar, sum eru vinarliga sinnaðir mótvegis Ísrael, hava sera stóra ávirkan á amerikanskan politikk, og at eingin amerikanskur politikari verður valdur, um hann ikki styðjar Ísrael meiri enn palestinararnar.

- Tann kongresslimur, sum javnsetir Ísrael og Palestina, fremur politiskt sjálvmorð, skrivar Carter.

Jødisku felagsskapirnir í USA eru í øðini í fyrrverandi forsetan, men Carter sýtir fyri at bakka so mikið sum ein tumma. Tvørturímóti herdi hann orðalagið, tá ísraelska útvarpið tosaði við hann nú um dagarnar.

- Ísrael hersetir palestinskt øki langt inn á Vestara Áarbakka og hevur gjørt ein veg til tær umleið 200 niðursetubygdirnar. Men palestinar kunnu ikki koyra eftir vegnum, og í fleiri førum sleppa teir heldur ikki at ganga tvørtur um vegin. Tí er ísraelska framferðin verri enn tann apartheid-framferðin, sum vit sóu í Suðurafrika, segði Carter í samrøðuni.

# Prestur stjól børnini

**Kenyanski presturin sannførdi tær barnleysu kvinnurnar um, at tær vóru vorðnar við barn við Jesu hjálp**



*Nøkur av børnunum, sum Gilbert Deya, prestur, burturflutti og gav barnleysum hjúnum*

Bretska løgreglan tók í gjár tann 54 ára gamla prestin Gilbert Deya, eftir at myndugleikarnir í Kenya hava biðið um at fáa hann útflýggjaðan.

Síðani hann kom til Bretlands, hevur presturin skipað samkomur í Birmingham, Nottingham, Liverpool og Manchester, har hann hevur boðið sær til at hjálpa barnleysum hjúnum at fáa børn ígjøgnum ”kraftarinnar bøn”.

Í heimlandinum er Gilbert Deya skuldsettur fyri at hava burturflutt minst tjúgu børn. Myndugleikarnir siga, børnini vórðu burturflutt og seinni latin barnleysum kvinnum, sum fult og fast trúðu presti, tá hann greiddi teimum frá, at hetta vóru teirra børn. DNA-royndir hava síðani prógvað, at kvinnurnar blivu lumpaðar, og tí vilja myndugleikarnir í Kenya hava fatur á presti.

Ein av teimum lumpaðu kvinnunum hevur greitt bretsku myndugleikunum frá, at hon fór til Kenya í september í 2003 eftir boðum frá Gilbert Deya. Tíggju mánaðir seinni, í juni í 2004, hevði hon fingið trý børn. Kvinnan greiddi frá, at hon fekk fleiri sproytur, og at hon var sannførd um, at hon var við barn við Jesu hjálp.

## STUTT SAGT

### Tømt hópgrøv

Serfrøðingar hava nú tikið leivdirnar av 277 fólkum upp úr einari hópgrøv har norðuri í Bosnia. Murat Hurtic, sum hevur staðið fyri arbeiðinum, sigur við AP, at fólkini vórðu fyrst jarðað eina aðrastaðni, og seinni vórðu líkini grivin uppaftur og flutt í hópgrøvina. Hesa framferð brúktu serbarnir fleiri ferðir í borgarakrígnum í Bosnia í einari roynd at fjala síni brotsverk. Nú skulu DNA-kanningar staðfesta, hvørji tey myrdu í hópgrøvini eru, og aftan á verða tey latin teimum avvarðandi.

### Burturi í 24 ár

Í 1982 burturflutti ein hermaður í El Salvador eina fýra ára gamla smágentu, men nú er gentan komin afturíaftur. Mamman, Maura Contreras, hevur leitað eftir døttur síni og tveimum øðrum børnum, sum eisini vórðu burturflutt undir borgarakrígnum, sum herjaði El Salvador frá 1980 til 1992. Við hjálp frá einum felagsskapi hevur hon nú funnið døttur sína aftur, men tað var eitt dulnevnt bræv frá einum hermanni, sum leiddi felagsskapin til gentuna. Myndugleikarnir í El Salvador siga, at umleið 700 børn vórðu burturflutt undir borgarakrígnum, og at stjórnarhermenn burturfluttu tey flestu.

### Kalla Putin upp

Russiski forsetin, Vladimir Putin, er nógv avhildin í heimlandinum. Nógvar russiskar kvinnur halda forsetan vera sera tekkiligan, og nógvir russiskir menn royna at ganga í somu litríku klæðum sum forsetin. Fleiri russisk foreldur velja eisini at doypa synirnar Vladimir eftir forsetanum, alt fleiri barrir bera navn hansara, og fleiri tónleikabólkar gera løg um hann.